# Jan skal spæla finalu fyri níggjundu ferð í fimtan ár

**HB veteranurin, Jan C. Dam, heldur, at tað hevur verið stuttligt hvørja ferð, men onkrar finalur standa fremri í huganum enn aðrar**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*



*Jan Dam fer ólavsøkudag at spæla sína níggjunda steypafinalu.*
*Mynd Savnsmynd*

Hann hevur ikki høga sigarføring. Hann sigur ikki so nógv, men hann hevur verið drúgvur, og hann hevur verið trúgvur gestur í finalunum um løgmanssteypið. Tað er 33 ára gamli Jan C. Dam, annan av miðverjunum hjá HB, sum vit tosa um. Ólavsøku dag skal hann á vøllin fyri at vera við í stríðnum um løgmanssteypið.

At Jan C. Dam er við í finaludystinum er ikki nakað nýtt. Seinastu fimtan árini hevur hann verið við í átta finalum. Tað vil siga, at mánadagin fer hann at vera við í finaluni fyri níggjundu ferð. Vit tora ikki at siga, at talan er um met. Men tað man ikki vera langt av leið. Um onkur annar hevur verið við í so nógvum finalum, so man tað vera onkur annar í HB, sum hevur verið annar parturin í finaludystinum nógv fleiri ferðir enn nakað annað felag.

Jan var við í tveimum teimum síðstu finalunum um ísafjarðarsúluna – í 1987 og í 1988. Síðani hevur verið spælt um løgmanssteypið, og Jan C. Dam hevur saman við HB spælt í finalunum í 1989, 1991, 1992, 1993, 1995 og í 1998. Tá HB var í finaluni í 1996 var Jan í KÍ, og tá HB var í finaluni í 2000, var Jan í B68.

Seks ferðir hevur Jan C. Dam verið á vinnandi liðnum, og tvær ferðir hevur HB tapt finaluna, tá Jan C. Dam hevur verið á liðnum. Fyrra ferðin var í 1991, tá B36 vann, og seinna ferðin var í 1993. Ta ferðina var neyðugt við tveimum dystum ímóti B71, men Jan spældi bara við í fyrra dystinum, sum endaði við javnleiki.

### Fremstar í huganum

Jan C. Dam sigur seg minnast væl til allar finalurnar. Tá vit spyrja, um tað ikki er onkur dystur, sum hann minnist serliga væl, so nevnir hann trý árstøl:

– Í 1987 var eg nítjan ára gamal. Vit spældu ímóti ÍF, og tað var nakað serligt. Bæði tí talan var um fyrstu finaluna, og tí tað var neyðugt at spæla tveir dystir. Hetta árið høvdu vit eitt fínt lið, sum kortini ikki vann FM. Tað var so spennandi, sum tað ongantíð hevur verið fyri ella síðani. GÍ og HB kappaðust við TB, sum vann FM.

– Finalan í 1989 ímóti B71 verður av fleiri søgd at vera tann besta, sum nakrantíð er spæld. Tað var neyðugt at spæla tveir dystir, og serliga í fyrra dystinum, sum endaði við javnleiki, var spælið gott. Og so var tað finalan í 1995. Vit vunnu 3–1 á B68, og eg var sera fegin. Árið fyri mistu vit FM á stokkinum. GÍ skoraði til 2–1 í yvirtíðini í Klaksvík. Vit vóru á Tvøroyri, og tað kendist sum størsta vónbrotið í mínum langa fótbóltslívið, tá tað var okkum greitt, at vit høvdu mist FM heitið, sum vit henda dagin lógu til at vinna.

Jan C. Dam nevnir ikki finaluna í 1998. Men hon man hava verið serlig fyri hann, tí henda dagin var Rúni Nolsøe ikki við, og Jan loysti av sum liðformaður.

### Øðrvísi spenningur

Hóast hann átta ferðir áður hevur verið í steypafinaluni, so gleðir Jan C. Dam seg og er spentur til ólavsøkudag. Men hann ásannar, at tað ikki kennist akkurát upp á sama máta, sum tað gjørdi fyri fimtan árum síðani:

– Í vikuni hava vit tosað um finaluna, sum nú stendur fyri. Tá søgdu onkrir av teimum yngru spælarunum, at teir vóru so spentir, at teir næstan ikki fingu sovið. Tað kendi eg aftur frá fyrstu finalunum, sum eg var við í. Nú er tað øðrvísi. Eg hugni mær við spenninginum, men hann tekur ikki burtur av svøvninum. Eg eri altíð spentur, tá eg skal spæla, og soleiðis verður tað eisini, tá vit skulu á vøllin at spæla finaluna.

### Hvør fer at vinna?

– Eg haldi, at talan verður um heilt opna uppgerð. Teir í NSÍ eru svangir, tí teir ongantíð hava vunnið FM og steypafinaluna. Teir hava ikki so nógvar royndir sum vit, men teir eru sera væl skipaðir, og teir fara neyvan at vera so læstir, sum tað viðhvørt sæst, at lið eru, sum fyrstu ferð royna seg í finaluni. Hóast HB hevur verið í nógvum finalum og vunnið nógv FM heiti, so tykist liðið í ár at vera sera uppsett at vinna hvørja ferð, og vit fara í hvussu so er at gera okkara fyri at vera við til at lyfta finaluna upp, og vit vóna sjálvandi at vinna. Men tað verður ivaleyst sera spennandi.

# Lív í aftur ólavsøkuklassikaran

**Gamli klassikarin millum Kyndil og føroyameistararnar VÍF verður spældur ólavsøkuaftan kl. 20 í høllini á Hálsi**

HONBÓLTUR, MENN
*Heini í Skorini*

Tá Kyndil og VÍF brustu saman fyri nøkrum árum síðani, varð tað mett at vera einki minni enn ein klassiskur stórdystur. Seinastu árini er spenningurin og áhugin undan hesum dysti minkaður, m.a. tí Kyndil reint ítróttarliga hevur verið í einum aldudali

### - Kyndil skal endurbyggjast

Men nú eru ætlanirnar at fáa lív í aftur gamla ólavsøkuklassikaran millum Kyndil og VÍF. Finnur Helmsdal er virkandi formaður í Kyndli, og hann sigur við Sosialin, at hesin dysturin skal vera byrjanin uppá eina endurbygging og endurnýggjan av Kyndli.

- Í Kyndli verður hesin steypadysturin tikin í størsta álvara, og er hetta byrjanin at byggja Kyndil uppaftur, sigur Finnur Helmsdal. Við tí leikaratilgongd, Kyndil hevur havt í summar, er sera sjónligt, at Kyndil hevur ætlanir um aftur at gera seg galdandi millum tey fremstu, og leikarar sum Hans Áki Dahl Christiansen, Finnur Hansson og leikandi venjarin Jacob Jónsson verða allir at síggja í grønu troyggjuni á ólavsøku og næsta kappingarár.

Finnur Helmsdal sigur eisini, at ólavsøkudysturin móti vestmenningum skal vera byrjanin at røkka nýggjum málum, og hann leggur afturat, at vestmenningar fáa brúk fyri so mongum viðhaldsfólkum sum gjørligt í høllini á Nabb 28. juli.

### - Vit leggja nógv í dystin

Ein av lyklaleikarunum hjá VÍF gjøgnum mong ár, landsliðsleikarin Ingi Olsen, sigur við Sosialin, at hóast VÍF er uttan nakrar av týdningarmiklu leikarunum, koma teir við sterkastu mannning sum tilber eftir umstøðunum.

- Tíverri mangla vit onkrar leikarar, men vit koma við sterkastu manning, sum í løtuni er tøk, sigur Ingi Olsen. Bróðurin Áki Olsen er skaddur, meðan Daniel Rapa og Ragnar Zachariassen báðir eru uttanlanda. Ingi sigur, at teir leggja nógv í dystin, ikki minst orsaka av mongu VÍF viðhaldsfólkunum, sum á hvørjum ári leita sær niðan í høllina.

- Vit hava altíð tikið ólavsøkudystin í álvara, og í veruleikanum hava vit verið nógv seriøsari enn Kyndil til henda dystin undanfarin ár, vísir Ingi Olsen á.

Ingi leggur afturat, at VÍF hevur vant í ein mánað nú, og at hesin dysturin er ein ábending um, hvussu liðini eru fyri, og at teir tískil ætla at vinna dystin eins og teir sera sannførandi hava gjørt undanfarin ár.




*Ingi Olsen og hinir úr VÍF ætla sær eins og undanfarin ár at leggja nógv í ólavsøkudystin móti Kyndli, sum er farið undir endurbygging av felagnum*



# – Spæla okkara spæl

**Hetta er áttanda steypafinalan hjá NSÍ málverjanum Jens Martini Knudsen, og hann sigur, at NSÍ fer til Havnar at spæla sítt spæl og ikki tillaga seg eftir oddaliðnum úr Havnini**

STEYPAFINALAN, MENN
*Heini í Skorini*



*Jens Martin Knudsen, sum skal spæla áttandu steypafinaluna ólavsøkudag, fær óivað ein lyklaleiklut í steypafinaluni móti HB*

- Einki er so keðiligt sum at tapa eina steypafinalu, men hinvegin verður eitt fótbóltssummar ongantíð heilt uttan luttøku í steypafinaluni, sigur Jens Martin Knudsen, málmanslegendan úr NSÍ, sum ólavsøkudag verjir málið fyri áttandu ferð í eini steypafinalu. Jens Martin sigur, at NSÍ liðið er væl fyri, m.a. orsaka av venjingarlegu í Íslandi við venjing tvær ferðir um dagin umframt tveimum venjingardystum.

### Skaði og leikbann

Hóast hópurin hjá runavíkingum er væl fyri, ásannar Jens Martin, at torført verður at avloysa leikbannaða álopsparið Óla Hansen og Sonna L. Petersen.

- Teir báðir hava fingið eitt gott samarbeiði í lag í álopinum í ár, og tískil verður torført at avloysa teir báðar. Men m.a. hava vit arbeitt við hesum í Íslandi, og tað sær bara gott út, sigur Jens Martin Knudsen.

Tað ljóðaði fyrr í vikuni, at bæði Helgi L. Petersen, danin Ulrik Balling og Pól Thorseinsson eru ivasamir til finaluna, men av hesum trimum er tað sambært Jens Martini bert Pól Thorsteinsson, sum enn er ivasamur.

### - Tillaga okkum ikki eftir HB

Jens Martin sigur, at NSÍ fer til Havnar at spæla sítt egna spæl, og so má HB gera sum teimum lystir.

- HB hevur víst sera góðar taktir í ár, men vit fara til Havnar at spæla okkara spæl og gera tað, sum vit eru góðir til. Hóast HB er oddalið, er munurin á stigatalvuni ikki størri enn so, at vit saktans kunnu vinna við okkara spæli, og tað trúgvi uppá, at vit gera.

Samanumtikið tykist NSÍ liðið sambært Jens Martin Knudsen at vera fult fyrireikað til stóru uppgávuna á Tórsvølli 29. juli.

# – Vóni eg gerist klárur

**Landsliðsleikarin og verjuleikarin hjá NSÍ, Pól Thorsteinsson, er bjartskygdur undan steypafinaluni, og hann roknar við, at NSÍ vinnur dystin. Pól er ivasamur til finaluna vegna skaða, men hann væntar og vónar at kunna spæla**

STEYPAFINALAN, MENN
*Heini í Skorini*



*Pól Thorsteinsson er ivasamur til steypafinaluna á ólavsøku, men hann væntar at kunna spæla. – Vit vinna dystin, sigur landsliðsleikarin avgjørdur*

Pól Thorsteinsson hevur síðani sítt gjøgnumbrot á landsliðnum á Malta á sinni verið roknaður millum bestu verjuleikarar í landinum. Tískil verður hann ein av lyklaleikarunum í finaluni, um hann verður førur fyri at spæla.

- Í løtuni eri eg ivasamur, men eg rokni við og vóni sjálvsagt, at eg verði førur fyri at spæla, sigur Pól Thorsteinsson.

HB hevur í ár havt uttan iva besta álopið í landinum, har Andrew av Fløtum og Jón Rói Jacobsen tilsamans hava skotið 19 mál í landskappingini, og tískil fær NSÍ harðliga brúk fyri landsliðsleikaranum í verjuni, tá liðini bæði bresta saman ólavsøkudag.

### Góður íslandstúrur

NSÍ hevur undan steypafinaluni verið á venjingarlegu í Íslandi, og Pól Thorsteinsson sigur, at hetta avgjørt hevur verið ein góður túrur fyri hópin, og at liðið nú er væl fyri, hóast NSÍ hevur bæði leikbann og skaðar í hópinum. Sambært Pól hava teir vant nógv og spælt tveir venjingardystir, og tí hava fyrireikingarnar verið góðar,

- Tískil haldi eg, at vit vinna dystin móti HB á ólavsøku, og tað hava vit alla orsøk til at trúgva uppá, endar ein avgjørdur vágbingur í útlegd í Runavík, sum sjálvur er ivasamur undan steypafinaluni móti HB vegna skaða.

# Pól er framvegis ivasamur

**NSÍ er bara eitt stig frá fyrstu Euopa Cup luttøkuni, og hóast teir eru skerdir í álopspartinum, so fara teir ikki til Havnar at grava seg niður**

STEYPAFINALAN, MENN
*Jóannes Hansen*

Fyri fyrstu ferð í trettan ára longu søguni hjá løgmanssteypinum er NSÍ annar parturin í endadystinum. Tí er tað einki at siga til, at spenningurin millum NSÍ viðhaldsfólkini er sera stórur. Tey fara til Havnar ólavsøkuaftan at fylgja 10–mannafarinum Eysturoyingi, og so fara tey suður aftur ólavsøkudag at síggja finaluna millum HB og NSÍ.

NSÍ er tað einasta av stóru feløgunum, sum ongantíð hevur roynt seg í Europa Cup. Ólavsøkudag kunnu teir tryggja sær atgongumerkini til UEFA Cup fótbólt komandi kappingarár. Tí er einki at siga til, at tað – umframt kappróðrartos – eisini verður tosað nógv um fótbólt í Runavík.

### Pól framvegis skaddur

Í gjáramorgunin kom NSÍ aftur av venjingarlegu í Íslandi. Í fyrranáttina svóvu teir í einum skúla á Egilsstøðum. Har vandu teir í oysandi regni fyrrapartin hósdagin, og so gekk leiðin til Seyðisfjarðar, og eftir eitt sindur av rulli vóru teir á Havnini tíðliga gjáramorgunin.

Eftir venjingardystin ímóti Þór á Akureyri nevndu vit, at tríggir av lyklaspælarunum vóru vøddaskaddir. Nú sigur venjarin, Jógvan Martin Olsen, at tað hevur tikið seg so mikið væl upp hjá Helga L. Petersen, at hann heilt víst fer at vera við í finaluni. Nógv bendir eisini á, at Ulrik Balling verður við. Hjá Pól Thorsteinsson er tað meiri ivasamt:

– Hann hevur fingið viðgerð alla tíðina, men enn er ikki greitt, um hann verður klárur, sigur Jógvan Martin Olsen, sum millum teir, ið ikki hava verið á liðnum síðstu tíðina, hevur Djóna N. Joensen, ið er komin fyri seg eftir skaða.

Vit hava fleiri ferðir nevnt, at NSÍ hevur tvey leikbann í álopspartinum. Men venjarin hevur sagt, at teir fara ikki til Havnar at grava seg niður. NSÍ fer at leypa á, og fyritreytirnar eru ikki versnaðar eftir at Ulrik Balling er komin úr Vejle og til NSÍ.

Klokkan ellivu í dag venur NSÍ á Svangaskarði. So halda teir frí inntil í annaðkvøld. Tá hittast teir í hølunum hjá Tryggingarfelagnum Føroyar í Runavík, og har fara teir at halda til, inntil leiðin ólavsøkudag fer at ganga í Gundadal.

NSÍ hevur tríggjar ferðir áður verið annar parturin í steypafinaluni. Men tað var áðrenn løgmanssteypið var uppfunnið. NSÍ var í finaluni um ísafjarðarsúluna í 1985, tá teir taptu 4–2 ímóti GÍ. Teir vóru í finaluni aftur í 1986, og tá vunnu teir fyri higartil einastu ferð. Mótstøðuliðið var LÍF, og NSÍ vann 2–1. Seinasta ferðin, sum NSÍ hevur verið í finaluni, var í 1988. Tá vóru finaluliðini tey somu, sum skulu spæla ólavsøkudag. HB vann 1–0, og Jóannes Jakobsen skoraði málið uppá brotsspark.

Á NSÍ liðnum hesa ferð er ein spælari, sum var við í áttati árunum. Tað er Jens Martin Knudsen, sum eisini hevur spælt finalu við GÍ og við Leiftri á Ólafsfirði. Pól Thorsteinsson hevur spælt finalur við VB og B36, og Helgi L. Petersen var á GÍ liðnum, sum í fyrraárið vann 1–0 á HB.

Hinir spælararnir eru allir óroyndir í finaluhøpi. Undan finaluni mánadagin er tað uppgávan hjá Jógvan Martini Olsen at fáa spælararnar at hvíla og at hava sjálvsálit, soleiðis at teir verða førir fyri at geva alt, tá teir ólavsøkudag fara at standa andlit til andlit við HB spælararnar, sum í steypahøpi hava væl fleiri royndir.